betri DEILDIN

# LEIKSKRÁ

16. september 2023

SKRÁ NR. 10

RUBEN MØLLER NIELSEN NR. 8




# 22. UMFAR

HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður
tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo




# Ítróttarfelag Fuglafjarðar

Fløtugerði - 530 Fuglafjørður
tel. 228771 if@if.fo www.if.fo

**Útgevari og ábyrgd**
ÍF-fótbóltur - Atli Petersen

**Sniðgeving og uppsetan**
Maibritt P. Bærentsen


betri.fo
Betri tannár
Til tín millum 13 og 17 ár
Kort
Netbanki
Nýtslukonta
Uppsparingarkonta
Boðtænasta
Fá ein ryggsekk, tá tú bíleggur títt fyrsta kort
Vitja eina av deildum okkara
betri

# INNIHALD


Dysturin í dag

Støðan í
Betri deildini

TEAM
ÍF

TEAM
07 Vestur

Dómarar

Toppskjúttar
eftir 21 umfør

Vildbjerg Cup 2023
– eitt upplivilsi
fyri lívið

ÍF-sangurin




INTERSPORT®
intersport.fo

taf.fo
the® athlete's foot®



BIRGIR PETERSEN

# DYSTURIN Í DAG

**Vælkomin til dyst í Betri-deildini.**
Seinasta umfar leiktu vit í Gundadali móti B36 og taptu tepurt 1-0, og kundu vit við eitt sindur av hepni stoli tað eina stigið, tí B36 hevði stóra yvirvág bæði í tjansum og spæli.

Vit taka í dag ímóti 07 Vestur, sum liggja sum nr 5, og eru teir endaðir í einum ordiligum ongamannalandi. 11 stig upp til 4. pláss og 11 stig niður til nr 6, so teir hava bara seg sjálvan at kappast við, og hava teir fingið sína størstu

stigaúrtøkuni fyri eitt kappingarár nakrantíð, í fremstu deildini.

Hjá okkum sansar av álvara at við at fáa stig á kontuna, tí at í skrivandi stund liggja vit enn undir niðurflytingarstrikuni. Um vit skulu geva okkum nakra vón um at sleppa at halda áfram í deildini, so skulu vit fáa stig í dag. Okkara unga lið hevur havt bæði upp- og niðurtúrar í ár, men vit hava sæð fleiri leikarar ment seg av álvara gjøgnum kappingina, so er bara at vóna at tað stóra arbeiði við at menna liðið mest við lokalum kreftum ikki fer fyri skeyti. So nú er at geva liðinum okkara fulla stuðul við at møta upp fjølment og heppa á teir í fulldrøn.

**Góðan dyst øll somul.**
**Koyrið á drongir**





VÓNIN®

MILLUM FREMSTU MENNARAR,
FRAMLEIÐARAR OG VEITARAR AV
DYGDARGÓÐUM FISKIREIÐSKAPI

## EFTIR 21 UMFØR

# STØÐAN

## Í BETRI DEILDINI HJÁ MONNUM

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 19 | 17 | 1 | 1 | 49 | 13 | +36 | 52 |
| 2 | B36 | 21 | 16 | 1 | 4 | 46 | 17 | +29 | 49 |
| 3 | HB | 20 | 15 | 2 | 3 | 56 | 15 | +41 | 47 |
| 4 | Víkingur | 21 | 13 | 3 | 5 | 52 | 20 | +32 | 42 |
| 5 | 07 Vestur | 21 | 9 | 4 | 8 | 34 | 32 | +2 | 31 |
| 6 | EB/Streymur | 20 | 6 | 2 | 12 | 22 | 37 | -15 | 20 |
| 7 | B68 | 21 | 4 | 6 | 11 | 21 | 37 | -16 | 18 |
| 8 | TB | 21 | 4 | 4 | 13 | 13 | 46 | -33 | 16 |
| 9 | ÍF | 21 | 4 | 0 | 17 | 19 | 58 | -39 | 12 |
| 10 | AB | 21 | 3 | 1 | 17 | 16 | 53 | -37 | 10 |

WWW.DYSTIR.FO

## 22. UMFAR

| | |
|---|---|
| 16.09.23 | ÍF - 07 Vestur |
| 17.09.23 | EB/Streymur - B36 |
| 17.09.23 | AB - TB |
| 18.09.23 | KÍ - B68 |
| 19.09.23 | HB - Víkingur |

## 23. UMFAR

| | |
|---|---|
| 24.09.23 | B68 - EB/Streymur |
| 24.09.23 | ÍF - AB |
| 24.09.23 | Víkingur - 07 Vestur |
| 24.09.23 | TB - KÍ |
| 25.09.23 | B36 - HB |


KES.FO
HVS - VENTILATIÓN - HITAPUMPIR - SERVICE
Hjá Klima Energi Service leggja vit okkum eftir at veita dygdarvørur og -tænastur innan hita, ventilatión og orkuoptimering. Harafturat bjóða vit eftirlit av hitapumpum og ventilatiónsskipanum, bæði til privat og vinnu.
Tørvar tær eina nýggja hitapumpu ella ventilatións- og luftskiftisskipan, ella vilt tú hava vegleiðing um orkuskifti, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.
DVI energi
INFO@KES.FO - WWW.KES.FO - 258030

| | | |
|---|---|---|
| Tóri **Traðará** | 🇫🇴 | 1 |
| Elvio **Gelmini** | 🇦🇷 | 2 |
| Jan **Ó. Ellingsgaard** | 🇫🇴 | 3 |
| Tóri **N. Olsen** | 🇫🇴 | 4 |
| Pól Jákup **Lundsbjerg** | 🇫🇴 | 5 |
| Karl **A. Løkin** | 🇫🇴 | 6 |
| Dánjal **á Lakjuni** | 🇫🇴 | 7 |
| Ruben **Møller Nielsen** | 🇩🇰 | 8 |
| Jhon Edy **Mena** | 🇨🇴 | 9 |
| Jóhan **Petersen** | 🇫🇴 | 10 |
| Markus **á Lakjuni** | 🇫🇴 | 11 |
| Hans Jákup **J. Lervig** | 🇫🇴 | 12 |
| Jákup **J. Nolsøe** | 🇫🇴 | 13 |
| Gundur **E. Petersen** | 🇫🇴 | 14 |
| Jákup **í Lambanum** | 🇫🇴 | 15 |
| Líggjas **Heðinsson** | 🇫🇴 | 16 |
| Jóhann **Højbro** | 🇫🇴 | 17 |
| Petur M. **Lundsbjerg** | 🇫🇴 | 18 |
| Rúnar **Johnsson** | 🇫🇴 | 19 |
| Aron **Kensson** | 🇫🇴 | 20 |
| Rógvi **Matras** | 🇫🇴 | 21 |
| Elias **Lervig** | 🇫🇴 | 22 |
| Hans **Jacobsen** | 🇫🇴 | 23 |
| Gonzalo **Zárate** | 🇦🇷 | 24 |
| Bergur **Jacobsen** | 🇫🇴 | 25 |
| Sámal **Zachariassen** | 🇫🇴 | 34 |

| | | |
|---|---|---|
| Høvuðsvenjari: | **Aleksandar Jovevic** | 🇷🇸 |
| Hjálparvenjari: | **Bartal Eliasen** | 🇫🇴 |
| Málmansvenjari: | **Erling Joensen** | 🇫🇴 |
| Fysiskur venjari: | **Gudmundur Danielsen** | 🇫🇴 |
| Fysioterapeutur: | **Jónfríð Hansen** | 🇫🇴 |
| Liðleiðari: | **Rói D. Olsen** | 🇫🇴 |
| Liðleiðari: | **Heðin L. Olsen** | 🇫🇴 |
| Liðleiðari: | **Fríði R. Petersen** | 🇫🇴 |

INNIHALD

| | |
|---|---|
| Ari **Petersen** | 1 |
| Eiler **Fróðason** | 2 |
| Dánial Pauli **Lervig** | 3 |
| Daniel **Obbekjær** | 6 |
| Høgni **E. Nielsen** | 7 |
| Janus **S. Samuelsen** | 8 |
| Uros **Stojanov** | 9 |
| Jóhann **Joensen** | 10 |
| Jasper **Van Der Heydel** | 11 |
| Sámal **á Steig** | 12 |
| Hjalmar **Gudmundsen** | 14 |
| Steven **Van Dijk** | 16 |

| | |
|---|---|
| Julian **Mouritsen** | 17 |
| Jónas **Prior** | 18 |
| Jón **í Horni Nielsen** | 19 |
| Mathias **Voss** | 20 |
| Teitur **Olsen** | 21 |
| Jónatan **Nattestad** | 22 |
| Jóannis **á Steig** | 23 |
| Pætur **Akselsen** | 25 |
| Heri **Klakkstein** | 26 |
| Oddur **Petersen** | 27 |
| Magnus **Jacobsen** | 52 |
| Albert Theis **Nielsen** | 70 |
| Ási **Dam** | 77 |

Høvuðsvenjari: **Lars Arne Nilsen**

**INNIHALD**



DÓMARI

Eiler **Rasmussen**

magn




Green Marine Divers

Tlf.: +298 77 00 60

Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

SAMSKIP

SPEKT løggildir grannskoðarar

**Tórshavn**
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

**Klaksvík**
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo



# TOPP10

## MÁLSKJÚTTAR Í BETRI DEILDINI

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Páll **Klettskarð** (KÍ) | 15 |
| 2 | Adrian **Justinussen** (HB) | 14 |
| 3 | Mikkel **Dahl** (HB) | 12 |
| 4 | Sølvi **Vatnhamar** (Víkingur) | 12 |
| 5 | Martin **Klein Joensen** (Víkingur) | 11 |
| 6 | Valerijs **Sabala** (B36) | 9 |
| 7 | Uros **Stojanov** (07 Vestur) | 8 |
| 8 | Bjarki **Nielsen** (B36) | 8 |
| 9 | Árni **Fredriksberg** (KÍ) | 8 |
| 10 | Brian **Jakobsen** (AB) | 7 |

WWW.DYSTUR.FO

VILDBJERG CUP 2023

# Eitt upplivilsi fyri lívið

EFTIR: JÓAN PAULI JACOBSEN

Fyri einum lítlum ári síðani fóru fyrireikingarnar av álvara í gongd til Vildbjerg Cup 2023, sum er ein rættiliga stór kapping. Leikarar millum 7 og 17 ár kunnu luttaka, og tað eru okkurt um 10.000 luttakarar umframt foreldur og systkin. Til høvið verða 44 vøllir nýttir og har er undirhald, svimjihøll, hoppiborgir, fótbóltsspøl, diskotek osfr. Baboon City mundi kortini eiga fyrstaplássið. Sammeta vit við Summar Cup í Havn, so er leisturin hin sami bara nógv størri í vavi.



Beinanvegin varð ein arbeiðsbólkur settur og væl varð fingið burturúr. Roknað varð við, at eini 6.000-7.000 krónur skuldu dreingirnir gjalda í part og tískil máttu teir saman við foreldrunum savna nokkso nógv saman í stutta tíð.

Millum góðu átøkini var at selja lutaseðlar, selja kjálkar, koyra skrell, standa í kioskini hjá ÍF, selja tennisbóltar, bera post út, taka loft niður fyri Magn og enntá lótu bóltadreingirnir til felagskassan.

Fyrisitingarligi parturin skuldi eisini røkjast, tí ferðalagið skuldi hava innivist, klæðir skuldu bíleggjast og liðini skuldu tilmeldast, leikararnir skrásetast og luttøkugjaldið skuldi rindast. Liðini vórðu býtt eftir aldri, meðan yngri systkin nýttu møguleikan, har Vildbjerg bjóðar „spiller søger hold".



Ferðalagið valdi at húsast í húsvognum og við 19 leikarum umframt foreldrum, systkjum og venjarum, so gjørdist talan um ein lítlan býling í Timring, nakað sunnanvert Vildbjerg. Leikararnir spældu nærindis og bjóðaðu øðrum liðum av, meðan tey vaksnu hugnaðu sær, fortaldu krønikur, reypaðu og tóku samanum.

Sjálv kappingin vardi frá 3.–6. august. Nógvir dystir, fáir útskiftarar og leikararnir royndu yrkislívið í nakrar dagar. Leikararnir fingu kakao og vøddamýking millum dystirnar, so øll hjálptu til. Okkara stóðu seg heilt væl og venjingarstøðan var góð, so tað bilti ikki, at teir vóru fáir.

Teir yngru fingu eina flúgvandi byrjan, men vóru merktir av nervum, tá endastøðirnar skuldu gerast upp. Teir vístu frálíkt fótbóltsspæl og kundu eins væl vunnið kappingina, men endaðu á einum góðkendum 4. plássi av 33 liðum.

Teir eldru høvdu eina meira trilvandi byrjan, har teir annaðhvørt vunnu og taptu. Teir komu tískil ikki víðari, men tá endastøðirnar skuldu avgerast, tá vístu teir sannførandi fótbóltsspæl og lótu ongan iva vera um úrslitið. Endin varð, at teir gjørdust best of the rest.

Leikarar, foreldur og venjarar vóru á einum máli um, at ferðin var rættiliga væleydnað, hóast veðrið ikki var av tí allarbesta. Kappingin var væl fyriskipað, heilsugóður matur, lætt at koma til og frá vøllinum, samanhaldið var sera gott og øll fingu eitt upplivilsi fyri lívið.

NÝRÙM

Teknistova
einar@nyrum.fo
tlf 78 88 99



BMT

Byggimestarin Thomsen

Tel 580044
Alt kann gerast

TAKK FYRI STUÐULIN

# Leiðandi reiðarí í norðurhøvum




VARÐIN
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo

OKKARA KJARNUØKI

GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD



Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

SENDISTOVAN

# SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**